# 25 ára starvsdagur í kommununi

3. januar vóru liðin 25 ár, síðan Olga Knudsen byrjaði at arbeiða hjá Tórshavnar kommunu. Hon hevur øll árini starvast á Ráðhúsinum, skrivar heimasíðan torshavn.fo. Olga byrjaði sum ørindagenta á býráðnum 3. januar 1983, og fór í skrivstovulæru 24. november sama ár. Eftir at hon var útlærd, starvaðist hon eina tíð á roknskapardeildini, áðrenn hon fór á skrivideildina at starvast. 15. apríl 1999 flutti hon á Mentamáladeildina, har hon er enn. Tað eru ikki øll, sum hava verið líka drúgv sum Olga í Ráðhúsinum í Havn. Millum onnur hevur hon slitið næstan fimm borgarstjórar upp, sum hon skemtandi plagar at taka til. Borgarstjórarnir, Olga hevur arbeitt saman við, eru: Poul Michelsen 1983 – 1992, Lisbeth L. Petersen 1993 – 1996, Leivur Hansen 1997 – 2000, Jan Christiansen 2001 – 2004 og Heðin Mortensen 2005 – . Í samband við 25 ára starvsdagin hjá Olgu, varð skipað fyri hátíðarhaldi í Posthúskjallaranum hósdagin í farnu viku. Heilt fitt av fólki var komið saman at heilsa Olgu.





vskum sjógvi, eru Christian í Grótinum (mynd), Tróndur í Gøtu, Finnur Fríði og Jupiter á leiðunum vestanrfyri Írland

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Seinastu túrarnir hjá línuskipunum Klakki (mynd) og Kvikki hava verið rímiliga góðir*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Bragdar hjá línuskipum

**Seinastu dagarnar er væl av línufiski komið upp á land í Klaksvík, og í morgin ella hósdagin koma ísfiskatrolararnir Navarin og Borgarin væntandi inn at landa**

FISKIVINNNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í gjár landaðu trý línuskip í Klaksvík. Fugltúgvan hevði 43.000 pund, Helena sløk 60.000, og Kvik hevði 105.000 pund, sum teir seldu fyri stívliga 700.000 krónur.

Fríggjadagin landaðu eisini trý línuskip í Klaksvík. Mesta fiskin hevði Klakkur, sum landaði 100.000 pund á 10 setum. Teir royndu norður úr Mykinesi.

Ågot og Grani, sum royndu á Íslandsrygginum, landaðu eisini fríggjdagin. Teir høvdu ávikavist 60.000 og 55.000 pund, meginparturin toskur.

### Lakari upsaveiða

Í dag er eingin landing í Klaksvík, men væntandi koma partrolararnir Borgarin og Navarin inn at landa í morgin ella hósdagin.

Úr Klaksvík frættist, at upsafiskiskapurin er lakari nú, enn hann var fyrstu túrarnar í árinum.

Borgarin og Navarin vóru ríkiliga fullir á fyrsta túri, tá teir høvdu sløk 300.000 pund tilsamans, men sum skilst, hevur ikki gingið so væl hendan túrin.

Trolbáturin Varðin kemur eisini inn at landa hósdagin, og í gjár høvdu teir góð 23.000 pund inni.

Úr Klaksvík frættist annars, at fiskaprísurin hevur verið góður, men hann er ikki eins góður, og hann var í byrjanini av árinum.

### Útróður

Í Klaksvík eru nógvir útróðrarbátar, bæði stórir og smáir. Tá ið viðrar, og streymurin er góður, eru nógvir bátar við línu.

Landingarmiðstøð Føroya útvegar hesum monnum krana, so fiskurin kann fáast upp úr bátunum, tá ið teir koma aftur at landi.

Pól Fugløy, landingarformaður, sigur, at bátarnir hava fingið nakað av fiski, men hann hevur ikki rættiliga fylgt við, hvussu gingist hevur seinastu dagarnar.

# Heykur og Falkur ikki klárir

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Enn er gongd ikki komin á hjá nýbygningunum hjá Faroe Seafood.

Skipini vóru úti eitt samdøgur fyri jól og lógu síðan, meðan verkfall var. Tá ið feløgini samdust um nýggjan sáttmála, og skipini fóru útaftur, vóru tey aftur úti í eitt samdøgur.

Væntandi er, tá skip eru nýggj, at ymiskar justeringar skulu gerast, áðrenn verulig gongd kemur á, og soleiðis hevur eisini verið við Heyki og Falki.

Í løtuni er Falkur á Skála, har ymiskt verður gjørt við skipið.

Ein av trupulleikunum hevur verið ísmaskinan og ein annar, at onkur el-talva er smeltað.

Sum skilst, er Heykur meira ella minni klárur at loysa.

Skipini komu til landið fyri hálvan desember, og eingin ivi er um, at bæði reiðaríi og manning leingist eftir at sleppa í gongd.



*Síðan Heykur og Falkur komu til landið fyri hálvan desember, hava trolini verið lítið í sjónum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*